**Upprit**

**um**

**yvirtøkulóg, altjóða rættarliga sáttmálagerð og sjálvsavgerðarrætt**

1. Til viðgerðar á Føroya Løgtingi eru tvey lógaruppskot og tvey uppskot um ríkislógartilmæli.

Uppskotini eru:

Løgtingsmál nr. 91: Uppskot til lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka.

Løgtingsmál nr. 92: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "lov om de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder".

Løgtingsmál nr. 95: Uppskot til lóg um altjóðarættarligar sáttmálar Føroya Landstýris at gera, og

Løgtingsmál nr. 96: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar: "lov om Færøernes landstyres indgåelse af folkeretlige aftaler".

Undir viðgerðini er ført fram, at løgtingið við at samtykkja hesi uppskot setir í váða sjálvsavgerðarrættin hjá føroysku tjóðini.

Felags fyri hesi fýra uppskotini er, at í báðum førum verður skotið upp at samtykkja eina lóg og eitt ríkislógartilmæli um ávíkavist yvirtøkur og altjóða sáttmálagerð. Hetta er óvanligur lóggávuháttur og ikki sørt óheppin.

Sum skilst av viðmerkingunum til uppskotini, er tað av politiskum ávum, at landsstýrið hevur ynskt, at broytingar ikki verða gjørdar í verandi heimastýrislóg í sambandi við hesi bæði málini um yvirtøkur og um uttanlandsheimildir. Eisini skilst á viðmerkingunum til landsstýrisins lógaruppskot, at landsstýrið á hendan hátt vil heita á tingið um at gera vart við sína fatan, bæði av verandi heimastýrislóg og teimum báðum (ella fýra) nýggju lógunum, sum ein sáttmála.

Harafturat hevur danska stjórnin kravt, at heimastýrismyndugleikarnir siga sína hugsan um uppskotið um "de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder" áðrenn hetta lógaruppskotið verður lagt fyri fólkatingið. Sambært §§ 47 og 48 í stýrisskipanarlógini, skal hetta vera gjørt við ríkislógartilmæli, sum skal leggjast fyri løgtingið.

Á hendan hátt fáa vit í roynd og veru tríggjar "heimastýrislógir" í staðin fyri eina. Hetta kann elva til tulkingartvørleikar, men er kortini ikki spurningur, sum skal umrøðast í hesum uppriti.

Uppskotið til yvirtøkulógina (løgtingsmál nr. 91) er ein víttgangandi øking av møguleikunum at yvirtaka sambært heimastýrislógini og hevur sostatt við sær munandi víðkaðar heimildir hjá føroyskum myndugleikum at yvirtaka málsøki.

Uppskotið um altjóða rættarliga sáttmálagerðir (løgtingsmál nr. 95) er í sínum innihaldi mest ein formlig staðfesting av mannagongdum, ið longu eru heimilaðar í § 8 í heimastýrislógini, og víðkar í ávísan mun hesar møguleikar, men er ikki so víðtøkin broyting í galdandi reglum, sum uppskotið um yvirtøku.

2. Ført hevur verið fram, at serliga viðmerkingarnar til tey bæði ríkislógartilmæli, við at vísa til grundlógina, skulu seta sjálvsavgerðarrættin hjá føroysku tjóðini í vanda.

Hvørki eftir stjórnarrætti ella altjóða rætti kann vera nakar ivi um, at føroyska tjóðin hevur sjálvsavgerðarrætt, so langt hesin røkkur eftir stovningarsáttmála Sameindu Tjóða, ST-aðalfundarsamtyktum, altjóða sáttmálum og rættarvenju ("State Practice").

Føroyingar hava valt at útbyggja hendan sjálvsavgerðarrætt í samstarvi við donsku stjórnina, heldur enn at taka til vápna.

Somuleiðis hevur danska stjórnin ferð eftir ferð viðurkent, at føroyingar hava hendan rætt og – um teir ynskja tað – rætt at býta frá danska ríkinum og stovna egið ríki.

Frá í sínum uppruna mestsum at vera ein politisk meginregla, er hugtakið um sjálvsavgerðarrætt alt meira vorðið viðurkent sum ein løgfrøðilig meginregla, ikki minst tá Sameindu Tjóðir stóðu á odda í avtøkuni av hjálandaveldinum.

Tað er kortini framvegis stór ósemja millum altjóða løgfrøðingar um veruliga innihaldið í regluni um sjálvsavgerðarrætt og hvussu langt hon røkkur í royndum. Tað er stórtsæð semja um, at sjálvsavgerðarrætturin ikki inniber rætt til einvegis loysing, uttan í heilt fáum, serstøkum førum. Hendan rættin hevur danska stjórnin tó sum omanfyri nevnt váttað føroyingum.

3. Kann sjálvsavgerðarrætturin avlutast?

Ført hevur verið fram, at løgtingið við at samtykkja omanfyri nevndu ríkislógartilmæli, við viðmerkingunum kann spæla sær føroyska kravið um sjálvsavgerðarrætt av hondum fyri ókomnar ættir.

Hetta er neyvan so.

Verða omanfyri uppskot samtykt, er tað orðalagið í uppskotunum, ið verður samtykt og ikki viðmerkingarnar. Hóast løgtingið ikki formliga samtykkir tær viðmerkingar, ið knýttar eru at donsku uppskotunum, verða hesar viðmerkingar tó týdningarmikil tulkingaríkast til sjálvar lógartekstirnar.

Omanfyri víst á tað óhepna í, at samtykkja tveir lógartekstir í sama máli. Hinvegin hevur hetta í sær sjálvum onga beinleiðis ávirkan á sjálvsavgerðarrættin.

Tað sær ikki út til at vera nakað í viðmerkingunum, sum ger seg inn á sjálvsavgerðarrættin hjá

føroysku tjóðini. At tað í donsku viðmerkingunum verður víst til løgfrøðiligar veruleikar, sum at grundlógin er í gildi í Føroyum, kann ikki metast at hava nakra ávirkan í hesum sambandi.

Í báðum lógaruppskotum er ásett í innganginum, at lógirnar byggja á sáttmála millum landsstýrið og stjórnina. Hvat nærri liggur í hesum kann vera ivasamt, men í minsta lagi samtykkja báðir partar, at talan er um sáttmála og ikki einvísa (føroyska ella danska) lóggávu.

Afturat hesum kemur, at uppskotið um yvirtøkulógina førir við sær munandi víðkan av heimildunum hjá føroysku myndugleikunum at yvirtaka málsøki, í mun til tað sum ásett er í heimastýrislógini.

Ført hevur somuleiðis verið fram, at um løgtingið samtykkir hesi lógaruppskot, eigur tingið at samtykkja eina yvirlýsing um, at lógirnar bert vera mettar at vera eitt stig afturat á leiðini til sjálvstýri og ikki sum ein avluting av sjálvsavgerðarrættinum.

Tað tykist sum, at landsstýrið eisini hevur hugsað um hetta, men hevur valt ta lógarteknist fløktu loysnina at gera síni egnu lógaruppskot, har tað í viðmerkingunum verður víst til ta føroysku fatanina, at henda lóggáva ikki skal skiljast sum ein uppgeving av møguleikunum fyri seinni at fara longur á sjálvsstýrisleið. Her kann verða víst á yvirtøkulógina, har ásett er í viðmerkingunum til føroyska lógaruppskotið, at løgtingins støða er, at sjálvsavgerðarrætturin er varðveittur.

Somuleiðis sum stór ósemja er um innihaldið í regluni um sjálvsavgerðarrætt, er ósemja um hvørt og á hvønn hátt hesin sjálvsavgerðarrættur kann avlutast.

Hesin spurningur tók seg serliga upp í sambandi við avtøku av hjálandaveldinum. Ein stórur partur av teimum hjálondum, ið fingu frælsi undir hesi tilgongdini, høvdu innanfyri tey landamørk, sum í sínari tíð vóru sett av hjálandaveldunum, ein hóp av tjóðum, sum í mongum førum ynsktu at loysa frá nýggju ríkjunum, ið stovnað vóru, og stovna nýggj ríki.

Í hesum viðfangi varð ført fram av stjórnunum í nýggju ríkjunum, at sjálvsavgerðarrætturin var intur við stovnan av nýggja ríkinum og avtøku av hjálandaveldinum og tí ikki kundi nýtast til framhaldandi frábýti í nýggj ríki.

Hetta sjónarmiðið hevur tó ikki fingið fulla undirtøku. Í okkara føri er serliga vert at vísa á Helsingfors-skjalið, ið varð samtykt tann 1. august 1975 av umboðum fyri 35 stjórnir í Europa og Norður Amerika.

Í grundreglu VIII í hesum skjali er ásett, at " By virtue of the principle of equal rights and self-determinaation of peoples, all peoples always have the right, in full freedom, to determine, when and as they wish, their internal and external political status, without external interferance, and to pursue as they wish their political, economic, social and cultural development".

Her er í greiðum orðum ásett, at sjálvsavgerðarrætturin er ein rættur hjá einari tjóð at taka avgerðir um politisku støðu sína, tá hon vil og á tann hátt, hon ynskir. Hinvegin verður einki sagt um, at sjálvsavgerðarrætturin kann avlutast ella fyrnast.

Tað er einki í sjálvstýristilgongdini í Føroyum, sum kann metast at vera ein avluting av hesum rætti, heldur ikki viðmerkingarnar til tey uppskot, ið eru til viðgerðar á løgtingi í hesum døgum.

Hóast ført kann verða fram, at Helsingfors-skjalið fyrst og fremst er galdandi fyri innanhýsis sjálvsavgerðarrættin, er hetta skjal ein týdningarmikil staðfesting av, at sjávlsavgerðarrætturin ikki lættliga verður avlutaður.

Tórshavn 10. mai 2005

Halgir Winther Poulsen